# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kristin Poulsen fer úr lærarastavinum



Fríggjadagin 30. september skipaði Fuglafjarðar Skúli fyri samkomu í samband við at Kristin Poulsen segði lærarastarvinum farvæl. Umframt allar lærarar og starvsfólk skúlans, vóru umboð fyri býráðið og skúlastýrið møtt. Mong rósandi orð vórðu søgd um Kristin, samsundis sum gávur og blómutyssir vórðu handaði honum.

Kristin Poulsen er føddur 11. septembur 1942 í Fuglafirði, sonur Richard Poulsen og Fransisku født Eliasen, bæði úr Fuglafirði. Stutt eftir at Kristin varð farin úr fólkaskúlanum, fekk hann arbeiði í Piddasahandli.

Har hann koyrdi vøru út til fólk, ikki við bili, men á súkklu, ið var gjørd til endamálið.

Kristin fekk tann stóra heiðurin at verða kallaður býdrongurin hjá Pidda.

Í 1958 hendi stórbroyting á skúlaøkinum í Fuglafirði. Framhaldsskúli, tá kallaður preliminerskúli, varð stovnsettur. Kristin var í tí næstfyrsta holdinum, og tók preliminerprógv í 1962. Haðani fór hann á Føroys Læraraskúla og tók prógv í 1967.

Hann byrjaðu sítt lærarayrki á Glyvrum og Søldarfirði. Í 1971 fór hann til Fuglafjarðar at vera lærari, og har hevur hann verið síðani.

Kristin hevði stóran áhuga fyri føroyskum, og í 1970 - 1971 var hann á ársskeiði á Fróðskaparsetri Føroya í føroyskum. Somuleiðis hevur hann tikið lut í øðrum styttri skeiðum, sum høvdu við byrjunarundirvísing at gera og skeiðum í týskum.

Kristin var ein nærlagdur lærari, álítandi og næmingar hansara fingu altíð væl burturúr. Somuleiðis var hann ein góður samstarvsfelagi, ið lærararnir í Fuglafjarðar Skúla fara at sakna.

Av øðrum Kristin hevur tikist við skal verða nevnt, at hann sat í líkningarnevndini í 8 ár og í kirkjuráðnum í 4 ár sum skrivari og kassameistari.

Kristin hevði stóran áhuga fyri ítrótti, og spældi hann í mong ár í bestu fótbóltsdeildini hjá ÍF. Somuleiðis var hann ein virkin limur í badmintonfelagnum, og tók lut í kappingum. Kristin er giftur við Dinnu, ið er ættað úr Leirvík, og eiga tey børnini Rúnu, Hallu og Fróða.

Kristin hevur nógv áhugamál, so hann fær ongar trupulleikar av at fáa tíðina at ganga.

Hann hevur stóran ans fyri náttúruni, og tí sum í henni livir, og mangan hevur hann verið hollur í ráðum og vegleiðingum, tá ið ivamál hava staðist um staðarnøvn, plantunøvn, fuglanøvn o.a.Lesihugurin hevur altíð verið stórur, og nú verða lesistundirnar betri, nú eingin skúli er at hugsa um, skúlin, ið Kristin altíð raðfesti høgt og nýtti sína orku til.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Arndal Mouritsen** úr Sørvági andaðist í heiminum leygardagin, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kedron mikudagin klokkan 13.00.

Tey, sum vilja minnast Arndahl kunnu lata Samkomuni Kedron eina gávu.

**Jón Sámalson,** Akureyri, ættaður av Rætt á Toftum, andaðist 28. septem.ber, 81 ára gamal. Jarðarferðin verður 10. oktober kl. 13.30 úr Akureyrar kirkju.

## Fjarritarar frá 1967



Hesir byrjaðu telegrafistskúlan hjá Fisher Heinesen 4. oktober 1965 og fingu prógv í 1967 Aftast frá vinstru. Niclas Danielsen, Leirvík, Petur Dahl Nolsøe, Vágur, Maison Mellemgaard, Klaksvík, Ebbe Bærentsen, Skopun (doyði í Trinidad 14/4-1983, 40 ár), Finn Salberg Olsen, Vágur, Odmar Joensen, Vestmanna, Petur Gardar, Klaksvík, og Mogens Højsted, Svínáir. Lærarar: Julius Poulsen, Kiss Linklett, Fisher Heinesen, Erik Danielsen. Afturat hesum tóku Martin Djurhuus, Sumba, og Jaspur Hjelm, Vágur, prógv í Danmark nakað aftaná.

*Myndaeigari: Petur D. Nolsøe*

## Finn Salberg Olsen 60 ár



Týsdagin 4. oktober verður Finn Olsen, Vágur, 60 ár.

Finn starvaðist sum fjarritari í Grønlandi ú umleið 15 ár og hevur síðani starvast hjá Strandferðsluni. Finn er giftur við Bjørg Olsen av Tvøroyri og eiga tey 3 børn og 5 abbabørn.

Frásøgukynstri hevur Finn sum fáur. Hevði hann nú fingið stundir, hevði eg lisið bókina »Frá St. Nord til Prins Chrstianssund« minst tvær ferðir.

**Heilsan Vinur**

i Sosialurin